

# Cairn fer at bora aftur í Grønlandi

**Jan Müller**

19.10.2013 - 21:18

Oljan.fo

Hóast skotska oljufelagið Cairn Energy nú um dagarnar boðaði frá, at tað endaliga fór at steingja boriholini, tað fór frá í Grønlandi nøkur ár herfyri, so hevur felagið kortini ikki slept grønlendsku oljuleitingini. Brunnarnir felagið boraði í Vesturgrønlandi fyri fáum árum síðani og sum kostaðu einar 6 mia. kr., góvu ikki tað úrslitið sum varð vónað, men nú felagið hevur sett út í kortið eina nýggja boriskrá fyri fleiri brunnar á Atlantsmótinum fyri 4 mia. kr., er Grønland partur av skránni. Tað sigur felagið í eini fráboðan.

Felagið fer eftir øllum at døma at bora ein brunn í Pitu leitiloyvinum í Vesturgrønlandi, sum tað hevur saman við norska Statoil. Felagið ætlar so eisini at leggja til brots aðrastaðni á Atlantsmótinum eitt nú vestan fyri Írland og út fyri Marokko í Afrika umframt at hugt verður eftir leitimiðjum í Senegal og Mauritania. Eisini verður hugt eftir norskum øki.

Hóast Cairn “brendi” av fleiri mia. kr. í turrum brunnum í Grønlandi, so er felagið framvegis ført fyri at fara undir stórar boriverkætlanir fyri pening tað hevur forvunnið í India. Sambært felagnum eru meira enn 12 mia. kr. tøkar til komandi borivirksemi.

Stjórin í Cairn, Simon Thomson sigur í einum tíðindaskrivi, at felagið er í ferð við at byggja upp eina loyvis- og boriætlan á Atlantsmótinum, úr Marokku fyri sunnan til Grønland fyri norðan, sum verður mett at vera sera gagnlig fyri partaeigararnar.

Enn eru Føroyar ikki vornar partur av arbeiðsøkinum hjá skotska oljufelagnum.

Mynd
Frá boringunum í Grønlandi nøkur ár herfyri.